## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum ella av landsynningi, turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi, men framvegis turt. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stormur av landsynningi og regn. Um kvøldið stomrur av ´suðri og útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Skrið ella stormur av útsynningi og suðri, sunnudagin nakað minni vindur av útsynningi. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 5 stig.



# Dansikapping fyri Suðuroyarbørn

Aftur í ár skipar Tvøroyrar Fimleikafelag fyri dansikapping fyri børn í skúlaaldri sunnudagin tann 15. februar 2009. Fimleikafelagið sigur, at øll børn í Suðuroynni úr 1. flokki og eldri kunnu vera við. Á hvørjum liði skulu 4-6 luttakarar vera. Gentur og dreingir kunnu vera á sama liði, og verða seriurnar, sum børnini gera, dømdar av dómarum.

**Kappingin verður býtt í hesar bólkar:**
**Bólkur 1:** 1. og 2. flokkur
**Bólkur 2:** 3. og 4. flokkur
**Bólkur 3:** 5. og 6. flokkur
**Bólkur 4:** 7. og 8. flokkur
**Bólkur 5:** 9. og 10. flokkur

Liðini finna sjálvi tónleik og seta saman eina seriu, og dømt verður eftir hesum: Samsvar millum tónleik og rørslu, hvussu trygg tey eru í venjingunum,
kropsburði, og hvussu skapandi og uppfinnsom, tey annars eru. Tað er loyvt at heinta hugskot úr eitt nú hip-hop, breakdansi, fimleika-serium. Serian skal vara millum 2 og 3 minuttir, men teir tveir yngstu bólkarnir kunnu sleppa við styttri tíð. Nr. 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki, og kostnaðurin er 10 kr. fyri hvønn luttakara. Bólkur eitt byrjar klokkan 15 í ítróttarhøllini í Trongisvági. Tó kunnu børnini byrja at venja kl. 13. Tekning innan 12. februar á tel. 504131.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | -13 |
| Qaqortoq | -12 |
| Ammassalik | -5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 6 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | -6 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 9 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 31 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 977 hPa. eystsan fyri Føroyar fer eystureftir og grynnist.



**Í dag:**
Ein veikur hátrýstryggur yvir Føroyum fer spakuliga eystureftir. Lágtrýstið vestan fyri Írland kemur handavegin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/01 kl. $06^{00}$ – 12/01 $06^{00}$. Hitin í gjár: 8,0°
Minsti hiti máldur í januar: -8,8° - Mesti hiti máldur í januar: 11,6°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 31,0 mm – mált frá 05/01 kl. $06^{00}$ – 06/01 $06^{00}$.
Avfallið higartil í januar: 99 mm


Alt um harmonikur



www.simme.eu







## VESTFALLSKYRRINDI

10. januar Mánin næstur jørðini
11. januar Fullmáni
18. januar Seinna kvarter
23. januar Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13 .jan | 8:24 | 20:48 | 7:24 | 19:48 | 7:39 | 20:03 | 10:24 | 22:48 | 11:24 | 23:48 | 6:39 | 19:03 | 5:39 | 18:03 | 8:39 | 21:03 | 9:39 | 22:03 | 8:09 | 20:33 | 9:24 | 21:48 |
| 14 .jan | 9:13 | 21:36 | 8:13 | 20:36 | 8:28 | 20:51 | 11:13 | 23:36 | - | 12:13 | 7:28 | 19:51 | 6:28 | 18:51 | 9:28 | 21:51 | 10:28 | 22:51 | 8:58 | 21:21 | 10:13 | 22:36 |
| 15 .jan | 9:59 | 22:20 | 8:59 | 21:20 | 9:14 | 21:35 | 11:59 | - | 0:36 | 12:59 | 8:14 | 20:35 | 7:14 | 19:35 | 10:14 | 22:35 | 11:14 | 23:35 | 9:44 | 22:05 | 10:59 | 23:20 |
| 16 .jan | 10:42 | 23:03 | 9:42 | 22:03 | 9:57 | 22:18 | 0:20 | 12:42 | 1:20 | 13:42 | 8:57 | 21:18 | 7:57 | 20:18 | 10:57 | 23:18 | 11:57 | - | 10:27 | 22:48 | 11:42 | - |
| 17 .jan | 11:25 | - | 10:25 | 23:00 | 10:40 | 23:15 | 1:03 | 13:25 | 2:03 | 14:25 | 9:40 | 22:15 | 8:40 | 21:15 | 11:40 | - | 0:18 | 12:40 | 11:10 | 23:45 | 0:03 | 12:25 |